gult21 cyan21 magenta21 svart21



## Hósdagur 3. mai

### SVF

18.30 Pinkupól 9
18.35 Jumanji 14
19.00 Ein urtagarður í Hallingdalen í Noreg – no. Sending
19.20 Skergarðurin – ein bátaferð í Norra (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Ferðaliðið – donsk dramarøð
21.50 Vald andanna 2 – donsk dokumentarsending
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2
23.20 Liðugt

### Eurosport

07:30 Tennis
08:30 Golf
09:30 Equestrianism
10:30 Super Racing Weekend(Tm)
11:00 Car Racing
11:30 Freestyle Motocross
12:30 Golf
13:30 Wrestling
15:00 Boxing
16:30 Olympic Games
17:00 Xtreme Sports
17:30 Tennis
18:30 Football (Live)
19:15 News
19:30 Football (Live)
20:15 Boxing
22:00 News
22:15 Football
23:15 Football
00:15 News
00:30 Close

### BBC Prime

00.00 TLZ: »Promised Land – The Walls of Jericho«
01.00 TLZ: »White Heat – Dirt And Disorder«
02.00 TLZ: »What have the 80s ever done for us?«
02.10 TLZ: »Background Brief - Chances Are…«
02.25 TLZ: »Science Bites: The Leopard's Spots«
02.30 TLZ: »The Next Big Thing – The Reality of Risk«
03.00 TLZ: »The Art of Breathing«
03.30 TLZ: »Food: »Whose Choice is it anyway?«
04.00 TLZ: »Deutsch Plus«
04.15 TLZ: »Deutsch Plus«
04.30 TLZ: »Zig Zag – Tudor Life – Entertainment: An Actor's Story«
04.50 TLZ: »Blood On the Carpet – The Frocky Horror Show«
05.30 TLZ: »Teen English Zone«
06.00 Jackanory: »Second Time Charley«
06.15 Playdays
06.35 Insides Out
07.00 The Really Wild Show: »Rubbish And Recycling«
07.30 Ready Steady Cook
08.15 Style Challenge: »Clothes Show Live, New Year's Eve Ba«
08.40 Real Rooms
09.05 Going For A Song
09.30 Vets to the Rescue
09.55 Antiques Roadshow: »Rugby«
10.25 TLZ: »The Great Detectives – The Simple Art of Philip Marlowe«
11.15 Country Tracks
11.45 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge: »Torville & Dean at Clothes Show Live«
13.00 Doctors: »Judgement Day«
13.30 Eastenders
14.00 Real Rooms
14.25 Going For A Song
15.00 Jackanory: »Second Time Charley«
15.15 Playdays
15.35 Insides Out
16.00 The Really Wild Show: »Rubbish And Recycling
16.30 Totp Eurochart
17.00 Home Front
17.30 Doctors: »The Sacrifice«
18.00 Eastenders
18.30 Animal Hospital
19.00 Keeping Up Appearances
19.30 Red Dwarf: »Cassandra«
20.00 Casualty
21.00 The End
21.30 Totp Eurochart
22.00 The Student Prince
23.35 Doctor Who: »Mawdryn Undead«

### BBC World

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Holiday (r)
02.00 BBC News
02.30 Reporters (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Top Gear (r)
06.00 BBC News
06.30 Reporters (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Talking Movies (r)
09.00 BBC News
09.30 Panorama (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Holiday (r)
12.00 BBC News
12.30 Panorama (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 Panorama (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

### 3 Viasat

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 Garfield og venner
07:30 TV-shop
08:35 Hvide Løgne(G)
09:00 Sunset Beach
09:50 Træneren
10:20 Horton-sagaen(G)
11:10 Horton-sagaen
12:00 Melrose Place - classic
12:55 Vild med dig
13:25 Panter-tanter
13:55 Ricki Lake(G)
14:45 Baywatch
15:40 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Hvide Løgne
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 Heksene fra Warren Manor
21:00 Skjulte Spor
22:00 Dagens Nyheder på TV3
22:15 Vore værste år
22:45 Simpsons
23:15 Ti tommelfingre
23:45 Michael Hayes
00:40 Kojak
01:40 I lyst og nød
02:10 Drøm videre
02:35 Vore værste år(G)
03:00 Walker, Texas Ranger
03:55 Godnat

### Útvarp Føroya

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlesturin Heri Tróndheim á Argjum lesur
07.15 Barnaløtan Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlesturin (e) Heri Tróndheim á Argjum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Ferðin til Zambora (e) Hans Tórgarð lesur 11. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála.
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e) Óluva Zachariasen leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e) Sigmar Bláberg stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Ársins Songrødd í Havn Ginna Midjord stílar fyri
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum Alexander Samuelsen stílar fyri
18.05 Barnaløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini

## Skergarðurin

*– ein bátaferð í Norra. (e)*

**SVF Hóskvøldið kl. 19.20**

Tað var ein floti av ikki minni enn 10 føroyskum bátum, sum í fjør stevndi út frá Bergen, og suður í gjøgnum tann norska skergarðin. Hetta ferðamál er um at gerast alt meira vælumtókt millum føroyskar báteigarar. Har eru vælskipað siglingarviðurskifti, men tað ræður sanniliga um at vera ansin, tí skerini eru mong. Sjónvarpið var við á ferðini, og vit fáa eitt innlit í, hvussu tað er at ferðast umborð á einum lítlum báti.

## Hetjur í Skriftini: Sámuel, maðurin sum skaraði framúr

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Í sendingarøðini um Hetjur í Skriftini eru vit nú komin til Sámuel. Sámuel verður sagdur at vera ein av størstu persónsmenskunum í søgu Ísraels. Sagt verður, at hann vigar eins nógv og Áron og Móses tilsamans. Sámuel var maðurin, sum savnaði tjóðina aftur, og gav fólkinum nýggjan kong. Hóskvøldið kl. 19.00.

*Armgarð Arge leggur til rættis.*

## Sabrina (99)

*– Amerikansk ungdómsrøð*




Sabrina varnast, at hon hevur givið øllum dreingjum krakk, síðan hon og Harvey fóru frá hvørjum øðrum, og hon gandar seg sjálva, so hon framyvir fer at siga ja við allar dreingir, sum bjóða henni út.

Ímeðan tekur Hilda sær av kaffistovuni, men hon ræðir allar kundarnar burtur, og Miles verður skotin í Zeldu.

## Hvide Løgne (457)

*– Donsk gerandisrøð*

**3 Viasat Hóskvøldið kl. 18.30**

Maria er vónbrotin um, at Oliver hevur gjørt av at fara til London, men fer hon at fylgja honum, og fer hann nakrantíð at koma heimaftur? Kim doyr av eitranini, og John fortelur nú Vibeke alt, sum hann veit um Christine og eitranina.

Helene sigur Peteri, at hon ikki vil hava barnið hóast alt, og tað skilir Peter als ikki. Jesper er klárur at flyta saman við Cille. Adam heldur, at peningurin hjá Sofie hevur broytt hana so nógv, at tað ikki gongur hjá teimum longur –men fer hann at gera tað liðugt?

19.00 Hetjur í Skriftini: Sámuel, maðurin sum skaraði framúr Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

### Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Norðlýsið! Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Léttur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EVR-sending "Hin djarvi, sum sakk!". Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90E-mail: girlzone@ras2.fo

### Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin, vertur er M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch, ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.05 "The Finishing Touch" heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti.
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Vertur: Jenis av Rana

Vit gevast uml. middnátt

# ítróttur

Nr. 80 • fríggjadagur • 27. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyameistararnir fuku avstað

**Eftir gylta kappingarárið í fjør tykjast KÍ-kvinnurnar aftur í ár at vera sera væl fyri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri góðari viku síðani varð lagt til brots við fótbóltinum í bestu heimligu kvinnudeildini. Enn hava vit ikki havt umrøðu av hesum, men hetta er sjálvandi eisini ein táttur, sum vit aftur í ár fara at taka upp og fylgja við.

### KÍ-stórsigur

Sum nevnt, so vórðu fyrstu dystirnir leiktir fyri góðari viku síðani, og úrslitini í hesum benda á, at kappingin í ár fer at líkjast teirri í fjør heilt nógv.

KÍ kvinnurnar, sum at kalla vóru einaráðandi í fjør, løgdu út á heimavølli móti B36, og ikki kann sigast annað enn, at tær bláu aftur líkjast einum heitum favoritti hetta kappingarárið.

Dysturin endaði við stórsigri til KÍ. 6-1 varð endaliga úrslitið, og úrslitið sigur helst tað, sum sigast skal um dystin. KÍ var snøgt sagt oman á í øllum lutum, og sýndi so dyggiliga fyri B36, hvussu fótbóltur eigur at spælast.

Lagt varð fyri longu í fjórða minutti, tá Vivian Bjartalíð setti høvdið á eitt innlegg, og so hevði heimaliðið longu sett seg á dystin. Fleiri mál komu tó ikki undan steðginum, men hetta tóktist tó á ongan hátt at nerva KÍ-kvinnurnar.

Beint sum seinni hálvleikur byrjaði, løgdu tær bláu aftur avstað, og Rannvá Andreasen og Malena Josephsen øktu til 3-0, áðrenn Súnfríð Simonsen minkaði um munin fyri B36. Seinastu trý málini átti KÍ eisini. Tað fyrsta av hesum var sjálvmál, áðrenn Malena Jospehsen og Rannvá Andreasen staðfestu sigurin.

### Javnleikur í Vági

Hin dysturin hetta fyrsta umfarið var í Vági, har næst bestu liðini frá i fjør, VB og HB hittust. Á stigatalvuni var lítil munur millum liðini tá, og eftir javnleikin hesa ferð tykjast støðan at vera á leið hin sama í ár.

Tað var annars um reppið, at øll stigini vórðu verandi eftir í Vági hesaferð. Eftir einum korterið hevði VB lagt seg á odda, tó at HB hjálpti væl til við hesum. Støðan helt sær fram til vanliga leiktíðin var farin, men við seinasta sparkinum eydnaðist HB at skorað. Hetta hendi, tá Annika Godtfred sendi hornaspark beinleiðis í málið. Hetta er ikki fyrstu ferð, at hon roynir at skjóta mál á hendan hátt, men neyvan man tað vera komið somikið væl við, sum tað gjørdi hesaferð.



*Størsta partin av tíðini var talan um støðugt trýst oman móti B63 málinum, tá føroyameistararnir úr KÍ settu sjøtul á landskappingina*

*Mynd: SjH*

### Broytt kapping

Kappingin ímillum kvinnuliðini í fótbólti er annars broytt nakað í ár, soleiðis at kappingin fer fram yvir tvey umfør. Eitt grundspæl og eitt endaspæl.

Í grundspælinum er 1. deild sett saman av KÍ, HB, VB og B36, meðan 2. deild er sett saman av tveimum bólkum. Tey bæði fremstu liðini í hvørjum av hesum bólkum spæla so hálvfinalur móti hvørjum øðrum, og sleppa vinnararnir av hesum at royna seg í endaspælinum.

Veruliga kappingin um FM byrjar ikki fyrr enn eftir summarsteðgin, og verður talan tá um seks lið í 1. deild. Trý tey fremstu frá grundspælinum, tey bæði vinnandi liðini úr hálvfinalunum í 2. deild, og so vinnarin av einum dysti millum nummar fýra í fyrstu deild og betra av teimum tapandi hálvfinalistunum.

Niðanfyri prentað vit støðurnar í 1. deild og teimum báðum bólkunum í 2. deild, umframt úrslit og málskjúttar úr dystunum í 1. deild.

### Støðan, 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 1 | 1 -0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 3 |
| 2 | HB | 1 | 0 -1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 3 | VB | 1 | 0 -1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 4 | B36 | 1 | 0 -0 - 1 | 1 | 6 | -5 | 0 |

### Støðan, 2. deild kvinnur

**Bólkur A**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 1 | 1 -0 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 | B71 | 0 | 0 -0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | ÍF | 0 | 0 -0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 | GÍ | 1 | 0 -0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Bólkur B**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 1 | 1 -0 - 0 | 15 | 1 | 14 | 3 |
| 2 | Skála | 0 | 0 -0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | Sumba | 1 | 0 -0 - 1 | 1 | 15 | -14 | 0 |

### 16. apríl

**KÍ-B36 6-1 (1-0)**
1-0: Vivian Bjartalíð
2-0: Rannvá Andreasen
3-0: Malena Jospehsen
3-1: Súnfríð Simonsen
4-1: Sjálvmál
5-1: Malena Josephsen
6-1: Rannvá Andreasen

VB-HB 1-1 (1-0)
1-0: Sjálvmál
1-1: Annika Godtfred

# Silvur í altjóða judokapping

**Føroyskir judoungdómar luttóku um páskirnar í stórari altjóða judokapping í Danmark, kallað Limfjords Cup**

JUDO
*tíðindaskriv*

Í hesari kappingini kappaðust einir 200 ungdómar úr umleið 10 ymiskum londum, og millum hesar eru 8 føroyskir judoíðkarar úr Havnar- og Sunda Judofelag.

5 av føroyingunum vóru í kapping páskaaftan, og best hylnaðist hjá Rólant Waag Dam úr Sunda Judofelag, sum vann silvurmerki í vektbólkinum -73 kg. Í hansara vektbólki vóru 8 luttakarar úr Norðanlondum umframt Týsklandi, og Rólant kláraði uttan trupulleikar at vinna seg fram at finaluni. Her møtti hann einum finnlendingi, sum tó fór av stað við gullinum.

Áki Davidsen og David Nilssen úr Havnar Judofelag kappaðust báðir í -45 kg., men hóast dystirnir hjá teimum vóru sera javnir, eydnaðist tað teimum ikki at koma víðari. Somuleiðis kappaðist Tórur Strøm úr Havnar Judofelag verið í bólkinum -66 kg., men heldur ikki hann megnaði at vinna nakran dyst.

Í unglingabólkinum kappaðust Andrias Thomsen og Christoffer Olsen úr Havnar Judofelag, men hóast javnar dystir komu teir ikki víðari í kappingini.

Úr Sunda Judofelag luttóku eisini Jógvan Páll Kristiansen og Teitur Joensen, men teimum hepnaðist ikki at vinna á útlendingunum, hóast teir góvu teimum stóra mótstøðu.

Føroyar hava luttikið í hesari kappingini í fleiri ár, men hetta er fyrsta heiðursmerkið vit vinna, hóast vit nakrar ferðir fyrr hava verið tætt við.



*Rólant Waag Dam vann seg fram í finaluna í bólkinum, -73, men mátti her lúta fyri sterkum finnlendingi*